# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Nú mugu tingfólk stýra sær

Tað tykist, at álvari er aftan fyri hugskotið hjá Hergeiri Nielsen, løgtingsformanni um aftur at skipa Føroya í fleiri valdømi, í hesum føri í fimm.

Tað var mest til stuttleika, at Sosialinurin herfyri spurdi øll tey 33 tingfólkini, um tey høvdu atkvøtt fyri einum møguligum uppskoti um aftur at skipa Føroyar í fleiri valdømi. Hugskotið fingu vit úr fyrispurningi frá Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmanni, sum vildi hava eina eftirmeting av broytingini, sum var gjørd við síðsta val, tá landið varð skipað í eitt valdømi.

Men álvaratos, tað er at halda land og fólk fyri gjøldur, at fyrsta úrslitið av eini eftirmeting er, at nú skal tingið taka støðu til aftur at fara til gomlu skipanina, ella eini, ið líkist henni.

Nakrar kvinnur føra fram í Sosialinum í gjár, at um tingfólk vilja hava »økiskvotering« innaftur í valskipanina, sum tær kalla tað, so vilja tær hava kynskvotering - ein avgjørt viðkomandi grundgeving. Júst hetta evnið viðgjørdu vit í oddagreini mánadagin, har vit staðfesta, at um formenninir í Javnaðar-, Sambands-, Fólka- og Tjóðveldisflokkinum gera av, at flokkarnir skulu hava so nøkulunda eins umboðan av báðum kynum, so fáa teir tað. Tað sama kunnu vit siga um »økisumboðanina«. Ynskja flokkarnir veruliga, at øll øki í landinum skulu verða umboðað, so er at stilla upp soleiði, at hetta ber til.

Veruleikin er korrini tann, at tingfólk ofta ikki hugsa fram um egnu nøs. At verða vald á ting er ein spurningur um vald. At lata øðrum vald, merkir av geva vald frá sær, og tað hava nógv tilfólk tað trupult við - tí er so trupult hjá monnum at lata vald frá sær til kvinnur - og somu mynd kunnu vit brúka upp á økisumboðanina.

Nú mugu tingfólk stýra sær. Mátin, sum Edmund Joensen nýtti, til tess at vinna sínum uppskoti um eitt valdømi frama, var ikki penur. Hesum kunnu vit verða samd í, tó at flestu okkara helst fegnast um, at vit nú kunnu velja fólk úr øllum landinum á ting. Men tað hjálpir so lítið at endurtaka mistakið, so sum Hergeir Nielsen ætlar.

Tað rættasta hevði verið, at løgtingið – ella innlendismálaráðið, sum varðar av økinum – eftirmetti nýggju valskipanina, áðrenn nøkur broyting verður gjørd.

Alt annað er at halda Føroya fólk fyri tað turra spott.

**Sosialurin**

## Ungdómsarbeiðsloysið skal fyribyrgjast

KRISTINA TOFTE-GAARD LARSEN
valevni Sjálvstýrisfloksins



Nú arbeiðsplássini fækkast kring landið, so eru nógv fólk, ið kenna sviðan av at missa sítt arbeiði. Hetta harmist eg um og vóni, at tit øll eru í eini skipan, ið kann tryggja tykkara livikor, og eg biði til, at umstøðurnar aftur geva góðan byr í arbeiðsseglini. Inn til tá vil eg ynskja tykkum gott treysti.

**Skapa arbeiði fyri teimum ungu**

Síðan vil eg koma við eini áheitan á allar flokkar á Føroya Løgtingi um at fyribyrgja ungdómsarbeiðsloysinum. Tí mæli eg til, at vit sum skjótast fáa eina 4 ára skipan, ið eggjar kommununum at skapa arbeiðsuppgávur til okkara unga fólk millum 15 og 21 ár. Tað er í hesum aldri, at fleiri ung eru liðug við fólka- ella miðnámsskúla og steðga upp, tí tey ikki kenna seg at hava orku, førleika ella hug at byrja eina útbúgvingarleið. Flestu av hesum ungu hava tørv á einum møguleika, at royna sína arbeiðsmegi í lokala samfelagnum. Tey hava tørv á at verða virkin og vinna sær nakað av peningi, meðan tey hugsa um sína komandi yrkisleið.

**Fyribyrgja forsorgarstuðul**

Tá eg her seti fokus á henda bólkin, so er tað tí, at hesi ikki hava vunnið sær rætt til at fáa útgjald úr ALS. Einasti møguleiki, um tey ikki eru farin undir útbúgving, er at fáa forsorgarstuðul, men eg meini, at okkara samfelag eigur at fyribyrgja hesum, tí tað ber til, um vit bera okkum rætt at.

**50% - 50% skipan**

Eitt hugskot er at hava eina 50% - 50% skipan á tann hátt, at kommunurnar skulu gjalda fyri at fáa endurgjald. Og tað hevur týdning, at tað verða kommunurnar, ið standa við bæði ábyrgd og heimild av at skapa og at skipa arbeiðið.

**Vinna pening**

Eg eri sannførd um, at ongar nettoútreiðslur verða av skipanini. Heldur fara vit at vinna pening aftur í seinasta enda við betri trivnaði og størri motivatión í unga fólkinum. Hetta gevur eisini ringvirkningar á øðrum økjum sum t.d. fyribyrging av kriminaliteti og rúsmisnýtslu. Færri fara at fáa forsorgarstuðul, og kommunurnar fara at raðfesta pening til okkara ungu samfelagsborgarar.

*Við ungdóms kvøðu.*

## Søgan um skattalættarnar

HELGI ABRAHAMSEN
løgtingsmaður



Høgni Hoydal harmast, í eini blaðgrein, um, at eg skal hava lagt hann og Tjóðveldi undir bæði líkt og ólíkt.

Nú veit eg ikki, hvar markið gongur ímillum tað sum er líkt, og tað sum er ólíkt, men eg má í hvussu so er staðfesta, at tað mangan hevur gingist honum illa at mótprógva mínum pástandum.

Nú vísir Høgni á, at eg havi gjørt ein feil í míni seinastu grein, og her má eg geva honum rætt. Eg havi, av eini ella aðrari orsøk, ikki lagt til merkis, at hóast hann spurdi um skattalættar fyri bæði land og kommunur (sum jú er ein rein manipulatión), so hevur Fíggjarmálaráðið kortini verið somikið at sær komið, at tað í svarinum, ikki hevur tikið kommunurnar við. Tað átti eg sjálvsagt at lagt merki til.

Men tá tað er sagt, so má Høgni geva mær rætt í tí, at skattalættarnir hjá ABC-landsstýrinum kostaðu ikki 382 mió. krónur. Hann má eisini geva mær rætt í tí, at hann orðaði spurningarnar til Fíggjarmálaráðið soleiðis, at árið 2004 (tá Sjálvstýrislandsstýrið gav stóran skattalætta), varð als ikki talt við. Harafturat vórðu skattalættarnir hjá Sjálvstýrislandsstýrinum og teir hjá ABC-landsstýrinum roknaðir út frá heilt ymiskum fortreytum. Eg skal greiða nærri frá hesum.

**Láturlig villeiðing**

Tá ABC samgongan samtykti at lække skattin fyri seinast vunnu krónuna, so var tað fyri, at tað skuldi loysa seg at arbeiða meira. Um vit siga, at hetta eydnaðist, og at fólk fóru at arbeiða meira, so merkir tað, at lønarútgjaldingarnar vuksu. Tá lønirnar vaksa, verður eisini meira goldið í skatti. Men nú kemur tað løgna í roknistykkinum. Tí jú meira landskassin fær inn orsaka av hesum, hægri verður talið, sum landskassin »missir« í mun til gamla skattastigan. Tí er spurningurin høpisleysur.

Lat okkum ímynda okkum at vit settu skattin uppá 100%. So høvdu øll hildu uppat at arbeitt, og landskassin hevði onga krónu fingið inn í skatti. Í tí førinum hevði svarið uppá spurningin verið, at skattabroytingin kostaði einki, tí landskassin hevði heldur onga krónu fingið inn eftir gamla skattastiganum, um eingin arbeiddi.

Hetta er fullkomuliga láturligt!

**Fakta**

Tað var breið politisk semja um, í 2002, at skattirnir skuldu lækka. Sjálvstýrislandsstýrið, sum frammanundan hevði lækkað blokkstuðulin við 366 mió. krónum, lækkaði eisini skattirnar við 125 mió. krónum eftir tveimum árum. ABC-landsstýrið lækkaði síðani skattirnar við 227 mió. krónum eftir fýra árum.

Tí kann tað ikki vera nakar ivi um, hvør lækkaði inntøkurnar mest, hóast “smartir” fyrispurningar og tíðindaskriv kunnu fáast til at vísa nakað annað.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Jaspur Langgaard jaspur@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.